# Stuðul til Barnagarðin á Gásamýru, Leirvík

Søkt verður eftir stuðli til barn við serligum tørvi. Talan er um 40t/viku, við møguleika fyri niðursettari tíð frá 1. mars 2008.

Talan er um tíðaravmarkað starv, barnsburðarfarloyvi, at byrja uml. 15. januar 2008.

**Søkt verður eftir stuðli sum:**

- Undir ábyrgd leiðslunnar og í tøttum samstarvi við foreldur og starvsfólk, er við til at skapa eitt trygt og mennandi umhvørvi fyri barnið.
- Dugir at samstarva / samskifta og er fyrikomandi.
- Er fúsur at taka á seg tær uppgávur og halda fram við tí arbeiðsgongd, ið er virkandi (teacch).
- Er stundisligur og nærlagdur

**Førleikar:**
Ynskiligt er, at tann, sum settur verður, hevur námsfrøðiliga útbúgving ella samsvarandi førleika.

Fyrimunur er eisini, um umsøkjarin hevur royndir at arbeiða við børnum við serligum tørvi.

**Lønar og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Barnagarðurin á Gásamýru**
**Stílað: Leiðarin**
**Gásamýra 13**
**520 Leirvík**

Umsóknarfreist: Mánadagin 26. november 2007 kl. 12.00

Nærri kunning um starvið, fæst við at ringja til leiðarin á tlf. 743125

Leirvíkar Kommuna

MIÐVÁGS KOMMUNA

# DAGRØKTARI til ansing í Sandavági

Søkt verður eftir dagrøktara at ansa børnum frá 0-3 ár.

**Vit vænta av tær:**

- At tú hevur góðar umstøður, at hava børn, bæði inni og uttanfyri.
- At tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú vísir virðing fyri børnunum, foreldrum og starvsfeløgum.
- At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- At tú ert tolin og vísir umsorgan.
- At tú hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- At tú dugir at sýggja møguleikar í staðin fyri forðingar.
- At tú hevur roykfrítt og viðkvæmisvinarligt heim.

Vit kunnu bjóða tær starv í eitt avmarkað tíðarskeið, í tryggum og góðum arbeiðsumstøðum, við góðum álítandi samstarvsfeløgum.

Tú kemur at virka undir Dagrøktarleiðaranum í Miðvágs Kommunu.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Dagrøktarleiðaran fyri Miðvágs Kommunu tlf. 33 29 60 ella 21 84 29 og tosa við Rósely Reynstind, dagrøktarleiðara.

**Umsóknarfreist:**
29. novembur 2007, kl. 16.00.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Miðvágs Kommuna**
**Dagrøktarskipanin**
**FO-370 Miðvágur**

RUNAVÍKAR kommunuskúli
Glyvravegur 10A · FO 625 Glyvrar
Tlf. 447331 · fax 447767
t-postur: rks@skulin.fo

# Størv sum stuðul í Runavíkar kommunuskúla

Til restina av skúlaárinum 2007/08 verður søkt eftir 1 stuðulsfólki 25 tímar um vikuna til næming við serligum tørvi.

Fyrimun hava umsøkjarar við royndum í mennandi stuðulsarbeiði og við viðkomandi útbúgvingum.

Løn samb. sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Vit vænta, at tú**

- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og ert hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Umsóknir**
Umsóknir við møguligum prógvum, c.v. og ummælum skulu vera skúlanum í hendi **í seinasta lagi leygardagin 24. nov. 2007, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið frá Ásmund Lamhauge, skúlastjóra á tlf. 447331 & 217331 ella Duritu P. Joensen, varaskúlastjóra á tlf. 447331 & 221363.

**Runavíkar kommunuskúli** hevur komandi skúlaár um 451 næmingar og um 50 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/rks

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.



# MÓTTØKA

**Vit eru flutt í nýggj høli á Frúutrøð 4.**

Í tí sambandi hevði tað glett okkum at sæð viðskiftafólk, starvsfelagar, vinir og kenningar í nýggju hølunum
**fríggjadagin tann 16. november 2007**
**frá kl. 15-17.**

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

# Tøkk til veljararnar!



Hjartaliga takki eg øllum tykkum í Havn, á Argjum, Tvøroyri, í Fuglafirði, Hósvík, Kvívík, Nólsoy, við Gjógv, í Gøtu, Hesti, Klaksvík, Leirvík, á Strondum, í Vági og Vestmanna, sum veittu mær persónligan stuðul á fólkatingsvalinum týsdagin.

Eg eri væl nøgdur við persónligu undirtøkuna, men harmar tað meg, at ikki fleiri tóku á við Javnaðarflokkinum, so fólkatingssessurin fekst aftur.

Vit falla tó ikki í fátt, men koma sterkt aftur!

Við javnaðarkvøðu
**Heðin Mortensen**



Grón
Tlf 312161
gron@gron.fo
www.gron.fo

Bestu piparnøturnar fáa tit hjá okkum

# Tørvar tær

vælgjørdan timburmann, ring so til

**J. T. D.-smíð**
**v/ Hera Thomsen, timburmeistari**
**Tlf. 219318/319318**